# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# So soltið sum sjáldan



*Tríggir málleysir javnleikir á rað hava kostað hjá HB, sum nú hevur mist oddasessin til EB/Streym*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í hesum umfarinum vórðu bara átta mál skorað og fyri fyrstu ferð í trý ár endaði tað tvær ferðir málleyst**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At tað gongur móti sumri kendist væl, nú 6. umfar í Formula deildini var á skráni. Umfarið varð spælt í bestu fótbóltslíkindum higartil í ár, og tað skal stór optimisma at ímynda sær, at líkindini kunnu verða eins góð næstu ferð, tá ið umfarið verður avgreitt yvir fleiri dagar.

At fótbóltsdystir eru á skránni gerandiskvøld hevur higartil í ár víst seg at vera áskoðarligt plettskot. Áskoðarar úr høvuðsstaðnum, ymsa staðni frá í Eysturoy og ikki minst úr Klaksvík vóru at síggja í Gøtu týskvøldið og eisini í Runavík mánakvøldið.

## Leyst oddalið

EB/Streymur er oddalið eftir seks umfør. Teir í EB/Streymi mettu sigurin í Runavík seratýdningarmiklan. Nú er gloppið aftur til favorittarnar í HB tvey stig, og sjálvandi vóna teir í Sundalagnum, at tað skal gerast nógv størri enn so. Í fyrraárið var EB/Streymur tíggju stig frammanfyri HB, tá ið tað ikki vóru so ógvuliga nógv umfør eftir. Men kortini megnaði HB so at siga á mállinjuni at taka teir aftur og gerast meistari.

Nógv kann venda øðrvísi í oktober, enn tað vendir nú. Men í løtuni eru tað ÍF og hesi bæði liðini, sum tykjast hava mest í sær. Spurningurin hjá fleiri er ivaleyst, hvussu leingi fuglfirðingar fara at megna at halda fram soleiðis, sum teir eru byrjaðir í ár. Higartil hava eingi tekin verið um, at teir ikki skulu halda fram við fína og hugflogsríka spælinum.

Á hvítusunnu fer Formula deildin at halda frí. Einastu fótbóltsdystirnir 2. hvítusunnudag verða seinnu hálvfinalurnar í steypakappingini. EB/Streymur má roknast sum favorittur á heimavølli ímóti B71, meðan tað er púra opið í Gundadali, har útgangsstøðið millum grannarnar er málleysið javnleikurin í 1. hálvfinaluni.

## Turrgelt HB

Serliga hjá HB hevur tað síðstu vikurnar gingið illa at finna meskarnar í mótstøðumálunum. Men tað er synd at siga, at talan sum heild var um nógv mál í 6. umfari. Samlaða máltalið var átta, og helmingurin av málunum vórðu skorað í Fuglafirði. So lágt hevur máltalið ikki verið síðani um jóansøkuleitið í fjør. Í 14. umfari í fjør vóru úrslitini KÍ-HB 0-2, VB/Sumba-NSÍ 1-2, Skála-GÍ 0-1, B71-AB 1-0 og B36-EB/Streymur 1-0. Mál vórðu skorað í øllum fimm uppgerðunum, men samlaða máltalið var átta. Eisini í 18. umfari í fjør, sum varð spælt 12. august, vórðu bara átta mál skorað. Tá vórðu úrslitini B71-VB/Sumba 0-0, AB-NSÍ 0-2, GÍ-KÍ 0-1 og Skála-B36 0-2.

Í hesum umfarinum endaði tað málleyst bæði í B36-Skála og Víkingi-HB. Ikki síðani í 2. umfari í 2005 hava tveir dystir endað málleysir. Ta ferðina vóru tað dystirnir TB-B36 og EB/Streymur-Skála, sum endaðu málleysir.

Samlaða máltalið higartil í ár er 81. Samlaða dystartalið er 30. Miðalmáltalið er sostatt 2,7. Undanfarnu árini hevur miðtalið verið hægri. Tað kundi boðað frá, at tað í ár verður lagdur uppaftur størri dentur á ikki at tapa, enn tað verður lagdur á at royna at vinna. Men nú fáa vit at síggja.

# Gott svimjihál í Esbjerg

**Svimjarar úr Havnar Svimjifelag kappaðust um vikuskiftið í stóru altjóða swimjistevnuni Danish International Swim Cup 2008**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Einir 1.800 svimjarar úr øllum Evropa vóru við til hesa stevnu, sum var skipað sum ein bólkakapping, t.v.s. at svimjarar føddir sama ár kappaðust hvør móti øðrum. Onkrar kappingar vóru tó skipaðar sum opnar kappingar, har øll kappaðust móti øllum, tó uppbýtt í kvinnur og menn.

Havnar Svimjifelag, saman við einum foreldrabólki tók fyrr í ár stig til hesa ferðina, fyri at svimjararnir hjá felagnum skuldu hava nakað venja fram ímóti, og at minnast aftur á, nú landsliðsarbeiðið hevur ligið í dvala, og einki røkist fyri at hesir svimjarar nakrantíð kunnu kalla seg landsliðssvimjarar.

Ikki kann annað sigast enn at væl gekst í Danish International Swim Cup 2008. Nógvir av svimjarunum betraðu munandi um svimjutíðir sínar, aðrir vunnu sær bronsunálina, sum er atgongumerkið til FM 2008, og uppaftur aðrir vunnu sínar kappingar.

Foreldrabólkurin, venjararnir Kristian Martin Joensen og Janus Olsen, saman við teimum 24 svimjarunum: Dánjal Hofgaard Hestoy, Jákup Símun Jacobsen, Andrass Thomsen, Hanus á Tjaldrafløtti Vestergaard, Ólav S Petersen, Elsa Sára Djurhuus, Dagmar M Winther, Guðrun Holm Jacobsen, Bjørg Seloy, Lisbeth L Joensen, Høgni Miné, Rúni Eliasen, Jaspur Houmann Midjord, Hjarnar Tórðarson, Jákup Klein Hansen, Magnus Jákupson, Jóhan H Erlingsson, Teitur Skoubo Nolsøe, Ragnhild P Østergaard, Tummas J Danielsen, Óli Mortensen, Janus Eystberg Hofgaard og Markus Joensen fingu eina ógloymandi ferð og nógv góð úrslit heimaftur við.

Magnus Jákupson skaraði framúr, og vann hann gullheiðursmerki í 200 blandað og 200 rygg, og silvurheiðursmerki í 100 blandað, 50 rygg og 100 rygg.

Høgni Miné vann sær gullheiðursmerki í 100 rygg, silvurheiðursmerki í 50 rygg, eitt 4. pláss í 100 blandað og eitt 5. pláss í 25 rygg.

Guðrun Holm Jacobsen vann gullheiðursmerki í 50 m frí og bleiv nr 6 í 25 frí.

Bjørg Seloy bleiv nr.7 í finaluni í 100m rygg.

Óli Mortensen og Hjarnar Tórðarson vunnu sær bronsunálina, og sleppa nú við til FM, har teir skulu svimja ta grein bronsunálin var vunnin í.

Næsta kappingin, sum er tann seinasta í ár hjá svimjarunum, verður vikuskiftið 16-18 mai, tá skipað verður fyri FM.